Sirið Stenberg
Hervør Pálsdóttir
vegna Tjóðveldi

Løgtingið

Uppskot

til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan
(Skeið í fyrstuhjálp)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum broytt við løgtingslóg nr. 46 frá 10. mai 1999, løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2000, løgtingslóg nr. 53 frá 9. mai 2005, løgtingslóg nr. 64 frá 7. juni 2007, løgtingslóg nr. 34 frá 28. apríl 2009, løgtingslóg nr. 67 frá 26. mai 2011, løgtingslóg nr. 157 frá 18. desember 2017, løgtingslóg nr. 44 frá 30. apríl 2018 og løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 2019, verður í § 8, stk. 1 sum nr. 5 sett:
"5) skeið í fyrstuhjálp."

§ 2

Hendan løgtingslóg kemur í gildi 1. august 2021.

Almennar viðmerkingar:
Stórur partur av gerandisdegnum hjá umleið 7.000 fólkaskúlanæmingum og umleið 700 fólkaskúlalærarum er í felagsskapi í skúlanum.

Vit halda tað vera alneyðugt, at fyrstahjálparskeið verður kravt undirvísingarevni í skúlanum. Hetta meta vit eisini er í samsvari við arbeiðsumhvørvið í skúlunum, har lagt verður upp til heilsubetri og tryggari umhvørvi.

Uppskotssetararnir mæla til, at ávegismál verða sett fyri 3. flokk, 6. flokk og 9. flokk. Tá næmingurin so er liðugur við fólkaskúlan, hevur hann eitt skeið og holla vitan í fyrstuhjálp.

Somuleiðis mæla uppskotssetararnir til, at Uttanríkis- og mentamálaráðið skipar so fyri, at 15 lærarar úr øllum skúlaøkjum í Føroyum verða útbúnir instruktørar. Hesir lærarar hava til uppgávu at ferðast runt oyggjarnar og uppstiga førleikar hjá næmingum og lærarum í fyrstuhjálp. Skúlin skal so líðandi standa fyri virkseminum og áhaldandi menna fyrstahjálparskeið á staðnum, til tess at fyribyrgja óynsktum vandastøðum.

Uttanríkis- og mentamálaráðið skipar eisini fyri, at námsætlan verður gjørd, sum greitt vísir á endamál og innihald í hesum kravda undirvísingarevninum. Í námsætlanini verður eisini nærri útgreinað, í

hvørjum aldursflokkum ymsu tættirnir í fyrstuhjálp verða avgreiddir, eins og útgreinað verður, í hvørjum vavi undirvísingin fer fram.

Eisini mæla vit til, at Uttanríkis- og mentamálaráðið tekur upp samstarv við tryggingarfeløgini Betri Trygging og Trygd fyri at veita útgerð og annan útbúnað til skeiðini.

Mett verður, at uppskotið hevur ikki stórvegis fíggjarligar avleiðingar við sær og kann haldast innan verandi játtan á fíggjarlógini.

Hetta uppskotið um skeið í fyrstuhjálp varð eisini lagt fyri Løgtingið í undanfarnu tingsetu (*løgtingsmál nr. 111/2019*), men vegna serligu støðuna við koronu í fjør, var hetta eitt av teimum uppskotunum, sum varð tikið aftur.

Serligar viðmerkingar:

Til § 1
Ásett verður, at fyrstahjálparskeið verður kravt undirvísingarevni í fólkaskúlanum, soleiðis at undirvísingin verður í hóskandi lærugrein og á hóskandi aldursstigi.

Til § 2
Gildiskomuáseting. Løgtingslógin kemur í gildi 1. august 2021.

Á Løgtingi, 5. mars 2021

Sirið Stenberg Hervør Pálsdóttir